## RBS við hópuppsøgn

Bretski bankin Royal Bank of Scotland kunngjørdi í gjár, at hann fer at skerja starvsfólkatalið kring alt landið, og at umleið 3.700 fólk fara at missa arbeiðið. Bretska stjórnin hevur hjálpt Royal Bank of Scotland og eigur nú 70 prosent av honum, og stjórnin hevur sagt, at hon ætlar sær at selja bankan. Tað sama ætlar stjórnin at gera við Lloyds Banking Group, sum tað almenna eigur 43 prosent av. Leiðslan í Royal Bank of Scotland hevur sagt, at ætlanin er at selja partar av bankanum fyri at lúka tær kappingarreglurnar hjá ES, ið snúgva seg um bankar, sum hava fingið almennan stuðul.




## Vanrøkja málið

Málfrøðingar í Grønlandi bera ótta fyri, at tað grønlendska málið verður sett til viks í tí almenna orðaskiftinum, tí at fjølmiðlarnir leggja ov lítlan dent á at brúka málið rætt. Arnaq Grove, málfrøðingur, sigur við kringvarpið KNR, at ofta er talan um tíðindi, sum eru týdd úr donskum, men har týðingin er so vánalig, at tann grønlendska útgávan er ein vavgreytur. Heldur hetta fram, kann tað enda við, at tey, sum bara duga grønlendskt, kunnu ikki luttaka í tí almenna orðaskiftinum, sigur Arnaq Grove við grønlendska kringvarpið.

# Eg bjargi ikki heiminum -

**Mánadagin 2. november fór 23 ára gamla Joan Varming til Kenya, har hon skal vera komandi tríggjar mánaðirnar. Joan er millum fyrstu sjúkrasystralesandi í Keypmannahavn, sum taka eina av starvsvenjingunum í Afrika. Sosialurin fekk prát við Joan, áðrenn hon fór avstað.**



SAMRØÐA
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

- Eg havi altíð, síðani eg var lítil smágenta, viljað farið til Afrika og gjørt ein mun, har tað veruliga er neyðugt. Og tá vit fingu tilboð um at taka eina av praktikkunum í Kenya ella Uganda, var eg ikki í iva, greiðir Joan Varming frá.

23 ára gamla Joan er úr Havn, men hevur seinastu tvey árini gingið á sjúkrasystraskúla í Keypmannahavn. Hon hevur verið á tveimum starvsvenjingum, og nú er tíðin komin til at taka ta triðju, sum snýr seg um Pædiatri –altso børn og mammur.

- Vit fingu at vita, at vit kundu sleppa á praktikk á lokalum, afrikonskum sjúkrahúsum ella á sonevndum heilsusentrum. Og eg skal á eitt heilsusentur, sum serliga tekur sær av pædiatri, sigur Joan.

### Einki rennandi vatn

Joan veit nærum einki um umstøðurnar, hon kemur til.

- Eg havi sjálvandi roynt at lisið eitt sindur og sum frægast kannað, hvussu umstøðurnar eru har niðri. Tað er ringt at ímynda sær, júst hvussu alt verður.

Hon greiðir frá, at tað er nógv fátækradømi og millum annað hava tey einki rennandi vatn. Reinførið, sum vit ganga so høgt uppí, er ikki serliga høgt í metum har, og streymurin er svikaligur, har hann yvirhøvur finst. Men eisini sjúkurnar eru heilt aðrar, enn tær, børn á okkara leiðum verða innløgd fyri.

- Har eru tað í høvuðsheitum malaria, aids og aðrar sjúkur, sum vit ikki møta í gerandisdegnum her heima, vísir Joan á.

Høvuðsuppgávurnar hjá Joan verða at geva sproytur, viðgera sár og at læra mammurnar um týdningin av reinføri. Og her fer Joan helst at renna seg í eina aðra stóra avbjóðing, nevniliga málið.

- Fleiri teirra tosa enskt, men høvuðsmálið er swahili. Eg havi tí verið á bókasavninum og lænt mær okkurt málsligt tilfar um swahili, men tað er óalmindiliga ringt at læra og úttala, sigur Joan flennandi.

### Pilot verkætlan

Hetta er fyrstu ferð, at sjúkrasystralesandi hava møguleika at fara til Afrika í starvsvenjing, og hetta skal vera ein roynd fyri at vita, um tað yvirhøvur kann lata seg gera. Samstarvið er spildurnýtt, og upprunaliga var ætlanin at senda fýra næmingar avstað. Tveir til Uganda og tveir til Kenya.

- Vit skuldu senda eina skrivliga umsókn og greiða frá, hví tey skuldu velja júst okkum. Eg var als ikki vís í, at eg fór at sleppa avstað, tí bara í okkara flokki vóru fýra, sum søktu. Og so komu allir hinir flokkarnir afturat, sigur Joan.

Tá avtornaði, vísti áhugin seg at vera yvirraskandi stórur, tí tilsamans 18 lesandi høvdu søkt um tey fýra plássini.

- Skúlin gjørdi tá ein stóran innsats, so øll, sum søktu, sleppa avstað.

Joan skal til eina lítla bygd, sum eitur Namasoli og liggur í hálendinum í vesturpartinum av Kenya, beint norðanfyri Victoria Lake.

Har skal hon starvast á einum heilsusentri, ið er eitt stað, har mammur kunnu koma við børnunum til kanningar og viðgerðar.

- Eg skal búgva privat hjá eini lokalari familju við fýra børnum. Eg havi fingið at vita, at tað er ein familja,

### FAKTA um Joan

- Joan Varming
- 23 ár
- Úr Havn
- Búsitandi í Keypmannahavn
- Sjúkrasystralesandi á øðrum ári
- Gongur á Professionshøjskolen Metropol, sum er ein av trimum sjúkrasystraskúlum í Kbh.
- Er í starvsvenjing innan Pædiatri í Namasoli í Kenya frá 2. november 09' – 31. januar 10'

### FAKTA um sjúkrasystraútbúgvingina

- Sjúkrasystraútbúgvingin tekur 3 ½ ár
- Lestrartíðin er ein blandingur av skúlagongd og starvsvenjing
- Útbúgvingin er umskipað til eina professiónsbacchelorútbúgving og er ein meðallong hægri útbúgving
- Møguleiki er at spesialisera seg innan eina ávísa deild, t.d. narkosu-, intensiv• ella barnadeildina.
- Møguleiki er eisini at útbúgva seg víðari og t.d. taka eina kandidatútbúgving á universitetinum.
- Til ber at taka sjúkrasystraútbúgvingina á tilsamans 24 støðum í Føroyum, Danmark og Grønlandi
- Útbúgvingin byrjar tvær ferðir árliga, í september og februar.
- Møguleiki er at fáa lestrarstuðul alla útbúgvingina.